# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Sam Høgnesen**, ættaður úr Elduvík, búsitandi í Esbjerg, andaðist mánadagin 11. juni 56 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

†

Kunngjørt verður ætt, vinum og kenningum, at góða mamma, omma og langomma okkara

**Daniella Andreasen**
Vestmanna

andaðist á Eldrasambýlinum 15. juni, 99 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd í útvarpinum.

*Fyri tey avvarandi*
**børnini**

Tey, sum ynskja at senda blómir ella krans, kunnu senda eina peningagávu til Eldrasambýlinum í Vestmanna. Konta í peningastovnunum.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ein ella annan hátt sýndu samkenslu, tá mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Sigrid Elisabeth Andreasen**
Sørvágur

andaðist og var jarðað
Tøkk til familju og vinir, ið hjálptu til við jarðarferðini og ervinum.
Tøkk til prest, kirkjutænarar, sangarar og berarar.
Tøkk fyri heilsanir, blómur, kransar og peningagávur til búfólkið á ellisheiminum.
Eisini takka vit tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Vegna familjuna*
**Kristina og Paula**

**Dagurin**

**16. juni. Tycho**. Í fjórðu ella fimtu øld var hann biskupur í Amatus á Kypros.

**17. juni. Bótolvsøka ella bótolvsmessa**. Munkurin Botolphus stovnaði kleystur í Lincolnshire í Onglandi, og býurin Boston eitur eftir honum. Hann doyði umleið ár 680. Navnið Bótolvur ella Bótal hevur verið brúkt sum mansnavn í Føroyum og kemur fyri bæði í samband við jørð og útróðrarmið.

**18. juni. Leontius**, deyður umleið ár 135. Heryvirmaður í rómverska herinum, sum varð tikin av døgum fyri trúar sakir.

# Sven Nørspang 60 ár



Mánadagin 18. juni fyllir Sven Nørspang í Hoyvík 60 ár.

Sven er dani, føddur og uppvaksin í Skagen, sonur Lisbeth og Svend Nørspang.

Hann eigur eina yngri systir, Gitte, sum býr í Århus.

Eftir lokna útbúgving sum elektronikkmekanikari kom Sven til Føroya í 1970, tá hann fekk starv á Nato-støðini á Sornfelli. Har arbeiddi hann til 1992, tá arbeiðsplássið varð niðurlagt.

Sven er ein sera virkin maður. Fyrstu árini hann kom til Føroya hevði hann handil og radioverkastað í Jónas Broncksgøtu í Havn. Hann hevur eisini arbeitt hjá ymiskum fyritøkum sum t.d. SEV og Sjónvarpi Føroya. Í dag arbeiðir hann á eldeildini hjá Tórshavnar Skipasmiðju.

Sven er mest kendur sum tann, ið kom við judo og jiu-jitsu (sjálvverju) til Føroya. Hann stovnaði Havnar Judofelag í 1971 og var formaður í felagnum í mong ár.

Tá judosambandið varð stovnað í 1981, kom hann í nevndina har. Frá 1990 – 93 var hann formaður í judosambandinum.

Sven er giftur Ásu, f. Patursson, ættað úr Kirkjubø. Tey eiga døturnar Svannu, Beintu og Anniku.

Vit ynskja babba hjartaliga tillukku við degnum.

**Heilsan døturnar**

# Jógvan Arge 60 ár



Sunnudagin 17. juni verður Jógvan Arge í Havn 60 ár. Jógvan man eiga eina ta kendastu røddina í landinum. Hann hevur verið útvarpsmaður síðani 1970, og nú er hann eisini varaborgarstjóri í Tórshavnar kommunu.

Jógvan er havnarmaður. Foreldrini eru Petra fødd Gregersen (1922) og ættað úr Syðrugøtu, og Niels Juel Arge (1920-1995), fyrrverandi útvarpsstjóri, sum var havnarmaður.

Ovarlaga á Tinghúsvegnum – yvir av gomlu telegrafstøðini - var barnaheimið hjá Jógvani, sum er næstelstur av fimm systkjum. Børnini hjá Petru og Niels Juel eru: Jórun Arge (1946), Jógvan (1947), Ólavur (1949), Suffía Eliasen (1951) og Magni (1959). Tey búgva øll í høvuðsstaðnum.

Abbin á faðirsíðuni var Óli Arge, Bil-Óli, sum var ættaður av Argjum, og omman var Malla, sum var ættað úr Vestmanna. Á móðursíðuni var omman Suffía og abbin Jógvan Elias. Tey vóru bæði úr Syðrugøtu, og í dreingjaárunum var Jógvan nógv í Gøtu.

Eftir nýmálsliga studentsprógvið í Hoydølum í 1966 fór Jógvan niður til Keypmannahavnar, har hann lærdi til journalist á tíðindastovuni Ritzau. Tá var útbúgvingin fyri tað mesta starvslæra ella praktikk og ikki so nógv skúlagongd. Jógvan hevur so ofta tikið til, hvussu nógv hann kendi seg at fáa burturúr á Ritzau.

Tað lá í kortunum, at Jógvan skuldi fara í útvarpið at arbeiða. Tað fór hann í 1970, tá ið hann var liðugur við útbúgvingina, og síðani hevur hann verið í útvarpinum.

Niels Juel var útvarpsstjóri, og tá ið Jógvan kom heim aftur, var útvarpið bara trettan ára gamalt, og harvið framvegis nýtt og við ógvuliga stórum týdningi fyri Føroyar og føroyingar. Útvarpið var partur av familjuni á Tinghúsvegnum, og Jógvan vaks upp í og saman við útvarpinum og starvsfólkunum har, tá ið alt var spildurnýtt, og tá ið tað heldur enn lønin og arbeiðsumstøðurnar vóru eldhugin og ábyrgdin fyri fremsta stovninum í tjóðarbyggingini, sum vóru drívmegin.

Nú hevur Jógvan í nógv ár verið leiðari á programmdeildini. Nógvu tey fyrstu árini var hann tíðindamaður og seinni leiðari á tíðindadeildini. Hann megnaði væl kunstin at vera poilitiskur journalistur uttan at gera seg til part av skipanini, og orð hansara vigaðu nógv, tá ið tað við døgurðaborðið og náttúrðaborðið kring landið varð lurtað við andakt, tá ið hann segði frá, um tað so var um samgongusamráðingar, fiskivinnusamráðingar í Caracas og Moskva ella marknaðarsamráðingar í Brússel.

Ítróttarfrásagnirnar vóru frá tí fyrsta, eftir at útvarpið varð sett á stovn, náttúrligur partur av skránni. Sum stórur smádrongur fór Jógvan at ganga pápanum til handa, og nú hevur hann í eini fjøruti ár varpað fótbólt og kapppróður út. Í tvey ár – 1978-1980 – var Jógvan formaður í ÍSF.

Millum aðrar tættir, sum Jógvan hevði hegni til og tískil náttúrliga tók upp eftir pápan, vóru sendingarnar Vit støkka inn á gólvið. Prátini og frásagnirnar um, hvussu føroyingar hava livað og virkað á landi og sjógvi, í friðartíð og krígstíð, heima á landi og úti í stóru verð og so víðari, eru perlur, sum eiga stóran týdning. Spell at hesar sendingarnar ikki longur eru á skránni í útvarpinum.

Í 1980 gav Jógvan út yrkingarsavnið 16 tættir. Í 1983 skrivaði hann saman við Niels Juel Arge Bankabókin. Sjóvinnubankin 50 ár, og síðani hevur hann skrivað og verið við til at leggja til rættis sekstan bøkur. Alt, sum Jógvan hevur latið úr hondum, er latið í sera dyggan málsligan búna.

Seinnu árini hevur Jógvan verið uppi í politikki. Síðani á nýggjárinum 2001 hevur hann umboðað Tjóðveldisflokkin í Tórshavnar býráði, og í valskeiðnum 2002-2004 var hann tingmaður. Tá ið nýggj samgonga varð skipað eftir býráðsvali í 2004, gjørdist Jógvan varaborgarstjóri.

Jógvan er giftur Maritu fødd Niclasen (1947) og ættað úr Nesi í Hvalba. Hon er útbúgvin pedagogur, og tey bæði búgva í góðum grannalagi í Tjarnardeild. Børnini hjá Maritu og Jógvani eru: Niels Juel (1966), Uni (1971) og Jóhanna (1972). Tey búgva øll í Havn. Niels Juel er búskaparfrøðingur, Uni tíðindamaður og Jóhanna løgfrøðingur. Jógvan eigur fýra abbabørn.

Føðingardagin eru Marita, sum seinni í summar verður seksti, og Jógvan burturstødd.

**J**